# TWR KVINNUR VIÐ VÓN

## *BØNARÁHEITANIR FYRI MAI 2026*

1. Harri, grøð kvinnur í **Angola**, sum eru merktar av kríggi, fátækdømi, og missi. Lat tær vinna til lívsins uppihald, og gev teimum vón. “Harrin grøðir tey, ið hava sundurbrotið hjarta, og bindur um sár teirra.” (Sálmur 147,3)
2. Gud, varðveit allar viðbreknar kvinnur í **Botsvana** frá útnyttan og ágangi, og set kúgað frí**.** Lat grøðandi kraft Tína veita teimum, sum eru offur fyri harðskapi, eina góða heilsu til anda, sál og likam. (Sálmur 9,10 – ensk: 9,9)
3. Harri, hjálp kvinnum í **Komorooyggjunum**, sum eru fjøtraðar í fátækdømi og avbyrging. Gev teimum vón, vnóg mikið til lívsins uppihald og møguleika til útbúgving. (1. Pætursbræv 5,7)
4. Faðir, lat hjún í **Esvatini** virða **sítt** hjúnalyfti, og velja at koma ásamt um tað, sum skilir tey fáa hjálp í trupulleikum, so familjur ikki verða syndraðar av sundurlesing  ella hjúnaskilnað**i**. (Efesusbrævið 5,31-33)
5. Gud, styrk tey trúgvandi í **Etiopia,** sum verða atsøkt fyri sína trúgv. Lat tey vera Jesusi lík og finna náði at halda fast við Teg. (1. Pætursbræv 4,13-14)
6. Harri, verj kvinnur í **Kenja** frá harðskapi og misnýtslu orsakað av kyni. Gev teimum dirvi, rættvísi, og grøðing, tí Tú ert teirra friðskjól og skansi í torførum tíðum. (Sálmur 18,3 – ensk: Sálmur 18,2)
7. Harri, brót leinkjurnar av barnagiftu í **Madagaskar**; við at veita gentum  møguleikar at fáa útbúgving, og signa tær við vísdómi og  óvikandi endamáli. (Sálmur 138,8)
8. Gud, verj kvinnur á **Mauritius** frá menniskjahandli, harðskapi og útnyttan. Gud, vit bøna Teg um snarliga at lata rættvísi ráða, veit  munagóða grøðing og varandi frið við Tínum máttmikla kærleika.  (Sálmur 34,19 – ensk: 34,18))
9. Faðir, í Jesu navni, grøð **Suður Afrika** frá skaðiligum patriarkalskum vanunum, sum seta kvinnur í vanda og skerja teirra trygd, heilsu og fíggjarliga frælsi. (Galatiabrævið 3,28)
10. Gud, grøð kvinnur í **Tansania,** sum líða undir sjúku**, sálarligum** løstum og andaligum sárum. Lat tær finna frið og góða heilsu í Tær. (Esaias 61,1-3)
11. Lat kvinnur í **Botsvana** koma at kenna virði sítt, sum tær hava í Tínum eygum, Harri. Ger tær førar fyri at nýta evni síni fyri Teg, og at vera leiðarar í familjuni og samfelagnum. (Efesusbrævið 2,10)
12. Harri, steðga tí andstygggiliga, ið hendir gentum í **Esvatini**, at tær verða neyðtiknar, tá ið tær fara til sínar næstu skyldmenn at biðja um hjálp til skúlagjald og tilfar. (Sálmur 82,4)
13. Orð Títt sigur, at Tú bjargar fólki Tínum “frá deyða og heldur lív í teimum, táið hungur er.” Faðir, uppihalt børnum Tínum í Kelafo økinum í **Somalia**. (Sálmur 33,18-19)
14. Gud, fría  kvinnur í **Suður Afrika** frá myrkursins ríki  til Títt ljósins og lívsins ríki, tær, sum eru upplærdar til gandalæknar. (Kolossebrævið 1,13)
15. Harri, lat kvinnur í **Tansania** fáa fíggjarligt gjøgnumbrot, starv og  vinnuligar møguleikar; signa handaverk teirra og slít fátækraringrásina. (Filippibrævið 4,19)
16. Harri, vit biðja, at Tú vilt endurbyggja húsarhaldini í **Botsvana**. Veit Tú frið, grøðing, og gott samskifti í øllum viðurskiftum. (Rómbrævið 12,18)

17. Harri, vit biðja fyri teimum, ið líða undir harðskapi orsakað av kyni í **Esvatini**. Lat kvinnudráp, sum mangan verða framd av teirra kæru, halda uppat í Jesu navni. (Orðtøkini 11,29)
18. Gud, veit frið í Tigray økinum í **Etiopia**. Virka frið í hjørtunum á leiðarunum, so at líðingin hjá fólkinum kann fáa ein enda. (Sálmur 27,1-3)
19. Harri, broyt skaðiligu ætlaninanar í **Suður Afrika**, sum niðurgera einligar kvinnur. Lat tær kenna virði sítt í Tær, so tær aldri kenna seg kroystar at giftast. (1. Korintbræv 7)
20. Himmalski Faðir, vit biðja um, at Tú vilt varðveita kvinnur og gentur í **Tansania** frá menniskjahandli, útnyttan og sviki. (Sálmur 27)
21. Harri, klæð kvinnur í **Botsvana** í styrki og tign, so tær kunnu tala og liva í vísdómi, og ganga framtíðini á møti uttan ótta. (Orðtøkini 31,25)
22. Faðir, vit biðja fyri børnunum í **Esvatini**, sum liva í djúpum fátækdømi, og sum hava ábyrgd av húsarhaldinum og samstundis tungu ábyrgdina av at taka sær av yngru systkjunum. (Orðtøkini 19,17)
23. Gud, Tú ert tann rættvísi dómarin og sært kvinnurnar í **Etiopia** verða kúgaðar. Harri, tala teirr søk, at tær kunnu fáa rætt. (Sálmur 103,6)
24. Harri, set kvinnur í **Suður Afrika** í frælsi, sum eru lumpaðar av óndum, religiøsum monnum, sum tala orð Títt, men hjørtu og gerðir teirra eru langt frá Tær. (Matteus 15,8-9)
25. Faðir, verj genturnar í **Tansania** frá barnagiftu og at gerast við barn í ov ungum aldri, so framtíð og lagna teirra kunnu verða vard í Tær. (Jeremias 29,11)
26. Harri, veit kvinnum í **Sansibar** og **Pemba,** sum søkja sær heilsubót fyri sínar sálarligu løstir (trauma), sálarligan tryggleika, frið í sinni og fría tær frá angist, tunglyndi og ótta. (Sálmur 34,5 – ensk:34.4)
27. Hjálp kvinnunum í **Botsvana** at standa stinnar í Tær, Faðir, sum tær royna at stýra sínum ótta í avbjóðingum í lívinum við náði **Tíni** og vísdómi frá Tær. (Jákupsbræv 1,5)
28. Harri, Tú ræður yvir øllum tjóðum. Vit biðja um eitt friðarligt og rættvíst politiskt val í **Etiopia** í juni. Lat reiðiligar og rættvísar leiðarar verða valdar. (Orðtøkini 29,4)
29. Harri, lat kvinnur í Suður Afrika, sum hava verið útnyttaðar av teimum, sum skuldu veitt teimum stuðul, fáa rættvísa viðferð, vernd og endurreisn. (2. Mósebók 14,14)
30. Harri, vit biðja, at friður, forstáilsi og kærleiki má valda í familjum og hjúnaløgum í T**ansania**. Legg Tína lekjandi hond á, har sambond, eru slitnað. (Kolossebrævið 3,15)
31. Faðir, hjálp kvinnum í **Suður Afrika** at líta á Teg og gleðast í Tær; lat tær trúgva Orði Tínum og fagna, hvussu høgt Tú virðir tær. (Sálmur 37)

**”Latið okkum tí við dirvi stíga fram fyri hásæti náðinnar,**
**so vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálp á rættari tíð!”**
***Hebrearabrævið 4:16***

***”Høvuðsstuðulin undir øllum kristiligum arbeiði er bøn”***
**Eeva Vähäsarja**

# Sameinandi hjørtu okkara í bøn

## EIN SØGA UM VÓN

## Frá einum útvarpstóli til mong hjørtu

**Eftir Joyce Malima, tjóðarsamskipara í Tansania**

TWR kvinnur við Vón í Sansibar, Pemba og Tansania broyta stillisliga lív – eitt hjarta í senn, sum lurtar. Í hesum økjum, har meginparturin av íbúgvunum hava annan átrúnað, og har siðbundi trúgv er sterk, er kristna læran mangan sjáldsom at hoyra ella torfør at fáa atgongd til. Tó, gjøgnum útvarpssendingar, radiotól, fundir í felagsskapum og venjingar, ber TWR Kvinnur við Vón kvinnum og familjum, sum hungra eftir sannleika, vón, frálæru og andaligan vøkstur.

Í heiminum hjá Mama Sarunye er ljóðið fra radiotólinum meira enn einans tónleikur ella røddir – tað er ljóðið hjá familjuni. Hvørja ferð radiotólið er tendrað, koma døtur hennara rennandi og lurta við stórum áhuga. Gjøgnum sendingar við frálæru, læra tey ymiskt nýtt um lívið, um fólk og heimin rundan um tey. Og gjøgnum sendingar við andaligum innihaldi vaksa tey í trúgv, í virðum og koma at skilja, hvat tað vil siga at elska Gud og tæna Honum. Útvarps sendingarnar eru vorðnar meir enn bert ein kunningarmiðil, men eru vorðnar eitt band, ið førir Mama Sarunye og døtur hennara nærri hvør at aðrari, og fyllir heim teirra við kærleika, virðing og samanhaldi.

Í mongum samfeløgum víða um í Tansania eru radiotól sjáldsom. Eittans tól gerst ein dýrgripur, sum kvinnur luta sín ámillum, og dregur tær saman at lurta. Tær sita tætt saman og halla seg móti radiotólinum, og taka til sín boðskapin um lívgan, bíbilskar sannleikar og praktiskan vísdóm.

Á plássum, har radiosignal ikki náa veitir TWR Kvinnur við Vón forritað lurtitól, so kvinnur kunnu lurta einsamallar ella í smáum bólkum, enntá í teimum mest avbyrgdu økjunum. Tá tær hava lurtað, hittast tær í smáum bólkum at samtala um, hvat tær hava lært, siga frá tí, ið tær stríðast við, og biðja saman. Hesir fundir eru vorðnir trygg pláss, har byrðar eru lyftar av og vinaløg eru skapað.

TWR Kvinnur við Vón lærir eisini kvinnur á staðnum at leiða hesar bólkar, fáa í lag orðaskifti og at vegleiða onnur. Hesir leiðarar gerast lýsandi vitar, sum skapa vón í samfeløgunum, har teir hjálpa øðrum at nýta bíbilska læru í gerandisligum avbjóðingum. Gjøgnum radiotól, lurtitól og samfelag andlit til andlit kann TWR Kvinnur við Vón náa út til kvinnur og familjur víða um í Tansania – har tey bera ljósið frá Kristusi inn í myrkastu krókarnar og planta sáð, ið fremur varandi broyting.

**Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til**
**at læra, biðja, lurta, vaksa og geva**

***KVINNUR VIÐ VÓN***
***twrwomenofhope.org***

***<u>Fíggjarstuðul:</u>***
***EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka***
***nr. 9181 000 533 7145***
***til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio). –***
***Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR. –***
***TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org***